# Heilivágsgjøgnumgongd

VERKÆTLAN Á ELLIS- OG RØKTARHEIMUM

APOTEKSVERKIÐ OG HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

JUNI 2017



Apoteksverk Føroya

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

# Indhold

1 Inngangur ... 3

2 Niðurstøða ... 4

2.1 Samanumtøka ... 4

2.2 Tilmælir ... 5

3 Tíðarnýtsla og kostnaður av royndarverkætlanini ... 7

3.1 Apotek ... 7

3.2 Ellis- og røktarheim ... 8

3.3 Kommunulæknar ... 9

4 Dygd í sjúklingaskrá ... 10

4.1 Heilivágsavstemman ... 10

4.2 Boðanesheimið ... 10

4.3 Eysturoyar røktar- og ellisheim ... 11

4.4 Samanumtikið ... 11

5 Heilivágsgjøgnumgongd ... 12

5.1 Boðanesheimið ... 12

5.2 Eysturoyar røktar- og ellisheim ... 12

5.3 Samanumtikið ... 13

6 Nøgdsemi hjá luttakarunum, sum hava verið við at fremja heilivágsgjøgnumgongdinar............................. 14

6.1 Kommunulæknar ........................................................................................................................ 14

6.2 Røktarstarvsfólk ......................................................................................................................... 14

7 Úrslit av heilivágsgjøgnumgongd ...................................................................................................... 16

Hjáløgd skjøl og tilvísingar ................................................................................................................... 17

Fylgiskjal I - Orðalisti - allýsing ........................................................................................................ 17

Fylgiskjal II - Tilvísingar .................................................................................................................... 18

Fylgiskjal III - Mannagongd í verkætlan – í stuttum ........................................................................ 19

Fylgiskjal IV - Flowdiagram ............................................................................................................... 20

Fylgiskjal V - Útreiðslumetingar ........................................................................................................ 21

# 1 Inngangur

Í 2014 varð ein arbeiðsbólkur settur at gera uppskot um, hvussu eitt skipað tilboð um heilivágsgjøgnumgongd ella persónliga ráðgeving um heilivágsnýtslu kann setast í verk fyri málbólkin 65 ár og eldri, sum fáa ávíst fleiri enn 4 sløg av læknafyriskrivaðum heilivági.

Arbeiðsbólkurin mælti til at byrja við eini royndarverkætlan við búfólkum á tveimum av teimum størru ellis- og røktarheiminum í landinum.

Endamálið við eini heilivágsgjøgnumgongd er at betra um viðgerðartrygd og –dygd hjá borgarunum. Harumframt verður herðsla løgd á skynsama heilivágsnýtslu, soleiðis at borgarin ikki fær óneyðugan heilivág, og kostnaður fyri heilivágsviðgerð verður avmarkaður so nógv, ið til ber.

Løgtingið játtaði pening til royndarverkætlanina, sum varð sett í verk í januar 2017. Verkætlanin fór fram á Boðanesheiminum og Eysturoyar røktar- og ellisheimi. Í tíðarskeiðinum frá januar til og við mai í ár vóru í alt 54 heilivágsgjøgnumgongdir framdar. Tveir farmaseutar við prógvi í ”medicingennemgang for farmaceuter”, framdu hesar heilivágsgjøgnumgongdir í samstarvi við avvarðandi røktarstarvsfólk og kommunulæknar.

Avgjørt varð at fremja heilivágsgjøgnumgongdirnar hjá viðkomandi borgarum í tveimum heimum við ymiskum arbeiðsgongdum og fysiskum kørmum. Á Boðanesheiminum fingu flestu búfólkini skamtlutaðan heilivág frá Apoteksverkinum. Tað vil siga, heilivágur, sum er pakkaður í dagligar skamtar í rullur til 14 dagar í senn. Á Eysturoyar røktar- og ellisheimi lutaðu røktarstarvsfólki allan heilivágin til búfólkini. Harumframt hevur Eysturoyar røktar- og ellisheim ein fastan kommunulækna til alt búfólkið (húslækna), sum kemur regluliga á heimið. Búfólk á Boðanesheiminum varðveita kommunulæknan, tey høvdu, áðrenn tey fluttu á Boðanesheimið.

Verkætlanin tekur støðið í nøkrum hypotesum, ið hava ymisk atlit, m.a. fíggjarlig- og lívsgóðskugrundað atlit:

At til ber at fáa skynsamari heilivágsnýtslu - færri heilivágstilbúningar og administratiónir[1] av heilivági hjá borgarum, fara at hava við sær eina minni heilivágsnýtslu og at lætta um borgarans røkt (færri administratiónir).

At skynsom heilivágsnýtsla kann bera við sær betri sjúklingadygd og –trygd, og kann geva borgarum eina betri heilsustøðu og lívsgóðsku.

Við støði í royndarverkætlanini er metta tíðarnýtslan til eina heilivágsgjøgnumgongd:

- Ein royndur farmaseutur brúkar uml. 2 tímar til eina heilivágsgjøgnumgongd við viðkomandi fundum og flutningi.
- Røktarheim brúkar 30 minuttir at savna tilfar og til fundir við farmaseutarnar.
- Kommunulæknin brúkar 10 minuttir saman við farmaseutinum at gjøgnumganga tilmælir.

[1] Administratión av heilivági: Tá røktarstarvsfólk geva borgarum heilivág. Talan kann vera um, at borgarin skal hava heilivágin ávísar tíðir.

# 2 Niðurstøða

Í niðurstøðuni verður tikið samanum niðurstøðurnar frá royndarverkætlanini, umframt tilmælini, arbeiðsbólkurin er komin ásamt um.

## 2.1 Samanumtøka

Verkætlanin vísir, at til ber at fækka um heilivágssløg hjá eldri borgarum á røktarheimum. Samanlagt fingu borgarar 5 % færri sløg av heilivági og 8 % færri administratiónir, tá heilivágsgjøgnumgongd varð framd. Hetta merkir, um alt annað er óbroytt, at útreiðslurnar til heilivág lækka, umframt at røktarstarvsfólk spara tíð til at geva/administrera heilivág.

Í hesi verkætlan kemur týðiliga til sjóndar, at eftirspurningur er eftir heilivágsgjøgnumgongd bæði frá kommunulæknum og øðrum heilsustarvsfólki. Bæði kommunulæknar og røktarstarvsfólk meta, at viðgerðin verður betur og tryggari hjá borgaranum, aftan á at farmaseuturin hevur framt heilivágsgjøgnumgongdina. Harumframt kenna røktarstarvsfólk, borgarar og avvarðandi seg vera tryggari við heilivágin hjá hvørjum einstøkum borgara, tá heilivágsgjøgnumgongd er framd.

Bæði kommunulæknar og røktarstarvsfólk vildu vera við, at heilivágsgjøgnumgongd vanliga ikki verður framd, tí torført er at fáa fatur á kommunulæknum til tílíkar eyka uppgávur. Ein av orsøkunum til, at kommunulæknar ikki raðfesta tíð til heilivágsgjøgnumgongdir kann verða, at samsýningarskipanin hjá kommunulæknumum er ikki hóskandi og tørvar tillaging.

Boðanesheimið metti, at heilivágsgjøgnumgongd passaði gerandisdegnum hjá teimum væl, meðan ein leiðari á Eysturoyar røktar- og ellisheimið helt, at arbeiðið við heilivágsgjøgnumgongd var sera tíðarkrevjandi. Tí metir arbeiðsbólkurin, at tað er umráðandi at finna ein skynsaman felags leist fyri heilivágsgjøgnumgongdir í Føroyum, við møguleika fyri smærri tillagingum eftir umstøðunum.

Dygdin og trygdin av heilivágslistanum í Cosmic[2] er sera vánalig. Í hesi verkætlanini vóru bert 4 av 54 heilivágslistum í Cosmic, sum samsvaraðu við heilivágslistan á røktarheiminum. Hetta er ein stórur vansi fyri borgarar í Føroyum.

Harumframt eru ábendingar um, at hóast farmaseuturin, í sambandi við heilivágsgjøgnumgongdina, sendir kommunulæknanum tilmæli um at rætta heilivágslistan í Cosmic, verður hetta bert gjørt í einstøkum førum. Kommunulæknar vilja harafturat vera við, at tað er ein vansi fyri trygdina hjá borgaranum at fáa skamtlutaðan heilivág. Hetta orsakað av, at skamtluting ikki altíð verður skrásett í Cosmic, men er á pappíri við síðuna av Cosmic. Tað vil siga, heilivágurin verður ikki skrásettur rætt í sjúklingaskránni hjá borgaranum. Læknar mæla til at fáa alla skamtlutan av heilivági í Cosmic.

Verkætlanin er sum heild væl eydnað, og mett verður, at tað er møguligt at heilivágsgjøgnumgongdir verða framdar innan teir karmar, sum vórðu settir í upplegginum um skipan av heilivágsgjøgnumgongd frá HIMR í september 2016.

Umráðandi er tó, at tíð og orka verða gagnnýtt á besta hátt, og at Apoteksverkið saman við Heilsu- og innlendismálaráðið ger ein samlaðan leist fyri heilivágsgjøgnumgongdir í Føroyum.

---

[2] Cosmic: Talgilda heilsuskipanin ella sjúklingaskráðin í Føroyum eitur Cosmic. Cosmic inniheldur sjúklingaskráir, heilivágsmodul, blóðroyndarsvar o.a.

## 2.2 Tilmælir

1. At borgarar á røktar- og ellisheimum fáa tilboð um heilivágsgjøgnumgongd eina ferð um ári. Mælt verður til at byrja verður við hesum bólkinum av borgarum.

   Kostnaðarmeting: Farmaseutur brúkar 2 tímar á 500 kr. til hvørja heilivágsgjøgnumgongd. Tað vil siga, 1.000 kr. pr. heilivágsgjøgnumgongd, umframt 139 kr. fyri hvørja heilivágsgjøgnumgongd hjá kommunulækna (sí tilmæli 3). Við tí útgangsstøði, at øll búfólk á ellis- og røktarheimunum tørva heilivágsgjøgnumgongd, er samlaða kostnaðarmeting fyri árliga heilivágsgjøgnumgongd hjá búfólki á ellis- og røktarheimum umleið 740.000 kr. (verður heilivágsgjøgnumgongd framd 3. hvørt ár er kostnaðarmetingin umleið 250.000 kr./ár).

2. Í øðrum lagi verður mælt til, at heilivágsgjøgnumgongd verður framd eina ferð um árið hjá borgarum, 65 ár og eldri.

   Samlað kostnaðarmeting fyri árliga heilivágsgjøgnumgongd hjá borgarum, 65 ár og eldri, sum fáa meira enn 4 læknafyriskrivaði sløg av heilivági, er mettur at vera umleið 4.6 mió. kr. (heilivágsgjøgnumgongd 3. hvørt ár er umleið 1.5 mió. kr./ár).

3. At áseta ein takst til kommunulæknar fyri heilivágsgjøgnumgongdir (nakrir kommunulæknar hava brúkt takstir, sum teir meta hava verið best hóskandi av teimum, sum eru í skipanini í dag).

   Mett verður, at tað tekur kommunulæknanum umleið 10 minuttir at gjøgnumganga hvørt tilmæli saman við farmaseuti, so møgulig broyting kann fremjast, og ivamál vera loyst beinanvegin. Hetta kann vera partur av samsýning.

   Mælt verður til, í samstarvi við Heilsutrygd, at eitt gjald verður stovnað til heilivágsgjøgnumgongdir hjá kommunulækna. Eitt hóskandi gjald kundi verið líknandi gjaldinum fyri eina konsultatión, sum er ásett til 15 min., meðan ein heilivágsgjøgnumgongd er mett at taka 10 min. (tvs. ydelsesnummer 0101 – 138,94 kr.).

   Mettar útreiðslur fyri heilivágsgjøgnumgongdir hjá kommunulæknanum síggjast í talvum í fylgiskjali V.

4. At ellis- og røktarheim fáa atgongd til Cosmic, so bert ein heilivágslisti er.

   Mælt verður til, at Heilsukós (HIMR)/Heilsukunning (LS) setir seg í samband við kommunurnar um møguleikarnar fyri einum samstarvi um atgongd til Cosmic. Mett verður ikki, at hetta fer at hava meirkostnað við sær fyri heilsuverkið.

5. At skamtlutaður heilivágur bert verður í Cosmic, og at tað bert verður ein heilivágslisti, so sleppast kann undan pappírum við síðuna av Cosmic.

6. At skamtlutananardeildin í Apoteksverkinum kann gera heilivágsavstemman og grova heilivágsgjøgnumgongdir av heilivágslistum í Cosmic og at seta seg í samband við kommunulæknar hesum viðvíkjandi.

   Møguleiki er fyri at raðfesta hetta innan verandi karmar. Mett verður tí ikki, at hetta hevur meirkostnað við sær fyri heilsuverkið.

7. At ávís heilsustarvsfólk kunnu nýta “klar til signering” í Cosmic, so læknar kunna spara tíð og bert skula góðkenna broytingar (seponeringar[3] mugu læknar tó gera sjálvir). Heilsukunning má góðkenna hesa broyting, møgulig tillaging av skipanini er eisini neyðug.

   Tilmælini, sum hava við sær øktar uppgávur/virksemi hjá Heilsukunning, tvs. krevja tillagingar/broytingar ella annað í Cosmic/Talgildu heilsuskipanina, tørva neyvari raðfesting hjá Heilsukunning.

[3] **Seponering:** Tá lækni steðgar viðgerð, er talan um seponering.

# 3 Tíðarnýtsla og kostnaður av royndarverkætlanini

Hetta brotið tekur samanum tíðarnýtsluna og kostnaðin av royndarverkætlanini.

## 3.1 Apotek

Í sambandi við hesa verkætlan vórðu 206.000 kr. avsettar á fíggjarlógini fyri 2017. Peningurin hevur verið brúktur til tímar, sum síggjast í talvu niðanfyri.

| **Uppgáva** | **Tímar** |
|---|---|
| Heilivágsavstemman | 31 |
| Heilivágsgjøgnumgongd | 138 |
| Notatskriving | 9 |
| Skriva tilmæli til lækna | 20 |
| Fund við røktarstarvsfólk | 23 |
| Verkætlanarfundir og leiðsla | 69 |
| Frágreiðing og savna hagtøl | 120 |
| **Íalt** | **410** |

Í alt vórðu brúktir 410 farmaseut-arbeiðstímar til royndarverkætlanina, hvør arbeiðstími er mettur at kosta 500 kr. Tískil hava samlaðu útreiðslurnar til hesa verkætlan veri uml. 205.000 kr. Tó skal sigast, at 190 arbeiðstímar hava verið brúktir til fundarvirksemi og frágreiðing, og hetta verður tí ikki partur av einum varandi tilboði um heilivágsgjøgnumgongd til borgarar í Føroyum.

### 3.1.1 Boðanesheimið

Í miðal varð 3 1/2 tími brúktur til hvønn borgara á Boðanesheiminum. Tíðin fevnir um: At fáa upplýsingar um borgara til vega, heilivágsavstemman[4], heilivágsgjøgnumgongd[5], fund við røktarstarvsfólk og tilmæli til kommunulækna. Tó skal sigast, at nógv meira tíð varð brúkt til teir fyrstu borgararnar í mun til teir síðstu. Sum dømi varð í miðal 4,86 tímar brúktir til fyrstu 10 borgararnar, meðan 2,08 tímar vórðu brúktir til teir síðstu 10 borgararnar.

### 3.1.2 Eysturoyar røktar- og ellisheim

[4] **Heilivágsavstemman:** Er eitt eftirlit av, um heilivágslistin á røktarheiminum (tað, sum borgarin tekur) og heilivágslistan hjá kommunulæknanum (tað sum er fyriskrivað í sjúklingaskránni – Cosmic) samsvara.

[5] **Heilivágsgjøgnumgongd:** Er ein kritisk gjøgnumgongd av hvørjum einstøkum heilivági. Her verður kannað eftir, um heilivágurin hjá borgaranum er skynsamur. Atlit verða tikin til, um borgari verður viðgjørdur eftir galdandi viðgerðarvegleiðingum á sjúkuøkjum, um borgari fær óneyðugan heilivág, um tað ber til at fækka um heilivágssløg, tablettir og administratiónir, um borgari hevur sjúku, sum ikki verður viðgjørd o.s.fr.

Í miðal varð 4 1/2 tímar brúktur til hvønn borgara á Eysturoyar røktar- og ellisheimi. Tíðin fevnir um: Fáa upplýsingar um borgara til vega, heilivágsavstemman, heilivágsgjøgnumgongd og fund við røktarstarvsfólk. Tó skal sigast, at nógv meira tíð varð brúkt til teir fyrstu borgararnar í mun til teir síðstu. Sum dømi vórðu í miðal 6,5 tímar brúktir til fyrstu 10 borgararnar, meðan 3,54 tímar vórðu brúktir til teir síðstu 10 borgararnar.

#### 3.1.3 Samanumtikið

Í verkætlanaruppritinum var mett, at tað tekur uml. 5,5 tímar at gera eina heilivágsgjøgnumgongd hjá farmaseuti (fyrstu 50 gjøgnumgongdirnar). Eftir 50 heilivágsgjøgnumgongdir verður mett, at tað tekur 1,5 tíma. Líkt er til, at tað er møguligt at gera heilivágsgjøgnumgongd innan hesar rammur, tí greið ábending er um, at farmaseutur verður meira royndur og effektivari eftir at hava gjørt fleiri heilivágsgjøgnumgongdir.

## 3.2 Ellis- og røktarheim

Tíðarnýtslan hjá ellis- og røktarheimunum til heilivágsgjøgnumgongdir verður lýst í hesum brotinum.

#### 3.2.1 Boðanesheimið

Í miðal varð 0,35 tími brúktur til fund millum røktarstarvsfólk og farmaseut fyri hvønn borgara. Røktarstarvsfólk hava brúkt nakað av tíð til at fáa samtykki og skriva upplýsingar um borgara til farmaseut. Ilt er at meta um neyvt tímatal, tí hetta er ikki skrásett. Í samrøðu við røktarstarvsfólk á Boðanesheiminum var greitt frá, at tey brúktu nakað av tíð til at fáa samtykki til vega. Viðhvørt greiddu borgarar frá sjúkusøguni, tá røktarstarvsfólk kom at spyrja um luttøku í verkætlanini o.a. Tað fór við nakað av tíð, men hetta var ikki ein trupulleiki. Starvsfólk á Boðanesheiminum greiddu annars frá, at nógv tíð fer til at fáa fatur á kommunulækna.

#### 3.2.2 Eysturoyar røktar- og ellisheim

Í miðal varð 0,49 tími brúktur til fund millum røktarstarvsfólk og farmaseut. Sí annars omanfyri. Røktarstarvsfólk á Eysturoyar røktar- og ellisheimi greiddi frá, at verkætlanin var tíðarkrevjandi, tí tey skuldu samla tilfar inn; kopiera, fáa blóðroyndir til vega, viga borgara og taka blóðtrýst í fylgjandi dagar (fyri at fáa best møgulig máting av blóðtrýsti). Hetta gera tey vanliga eina ferð um árið fyri allar borgarar á Eysturoyar røktar- og ellisheimi. Bæði kommunulækni og røktarstarvsfólk á Eysturoyar røktar- og ellisheimið ynsktu at varðveita hendan leist. Tey ynsktu at fáa starvsfólkaorku til hesa uppgávu. Starvsfólk á Eysturoyar røktar- og ellisheimið eru sera fegin um tætta samstarvið við kommunulæknan (Eysturoyar røktar- og ellisheim hevur fastan húslækna).

#### 3.2.3 Samanumtikið

Mannagongdin var rættiliga ymisk á Boðanesheiminum samanborið við Eysturoyar røktar- og ellisheimi. Sambært røktarstarvsfólkum tykist, at Eysturoyar røktar- og ellisheim brúkti meira orku til hetta arbeiðið enn Boðanesheimið. Harafturat varð merkisvert á Boðanesheiminum, at tað var betur at tosa um borgara við røktarstarvsfólk, sum beinleiðis hava røktina hjá borgara, enn deildarleiðara. Hetta kemur av, at røktarstarvsfólkið kennir betur borgaran.

Í sambandi við heilivágsgjøgnumgongdir á ellis- og røktarheimum verður mett, at tað er týdningarmikið at seta mál, sum eru møgulig at røkka, og at gera greiðar avtalur, so tíðin verður brúkt skynsamt. Ynskiligt er at fáa kommunulæknan at taka støðu til øll tilmælir, sum verða send til hansara og at kunna fylgja tey tilmæli upp, sum kommunulæknin ikki hevur viðgjørt.

## 3.3 Kommunulæknar

Tíðarnýtslan hjá kommunulæknunum til heilivágsgjøgnumgongdir verður lýst í hesum brotinum.

### 3.3.1 Boðanesheimið

Ilt er at meta um neyvt tímatal, sum lækni hevur brúkt til at hyggja at tilmælum frá farmaseuti. Í samrøðu við kommunulæknar í Tórshavn kemur tó fram, at teir ikki hava stundir at hyggja at hesum, og hetta verður ikki raðfest, uttan at ein takstur/gjald verður ásett fyri hetta arbeiðið.

Sum heild verður tíð til heilivág hjá borgarum raðfest lágt. M.a. verður heilivágur ikki eftirkannaður, tá reseptir verða endurnýggjaðar, og heilivágsgjøgnumgongd hjá borgarum verður ikki gjørd regluliga. Tíð má setast av í gerandisdegnum til hetta arbeiðið, men óvist er hvussu nógva tíð hetta krevur.

### 3.3.2 Eysturoyar røktar- og ellisheim

Á Eysturoyar røktar- og ellisheimi er húslækni, hann nýtir 1,5 tíma um vikuna á Eysturoyar røktar- og ellisheimi.

Í sambandi við verkætlanina tykist kommunulæknin ikki at hava brúkt stórvegis eyka tíð á Eysturoyar røktar- og ellisheimi. Hetta kom fram í samrøðu við røktarstarvsfólk og kommunulækna á Eysturoyar røktar- og ellisheimi.

### 3.3.3 Samanumtikið

Ilt er at meta um samlaðu tíðarnýtsluna hjá kommunulækna, men tað tykist ikki, sum hetta krevur so nógva tíð – serliga ikki á Eysturoyar røktar- og ellisheimi. Kanningar í Danmark vísa, at lækni brúkar 9 minuttir um hvønn borgara.

Hugsast kann tí, at ein loysn hevði verið, at farmaseuturin og kommunulæknin gjøgnumganga tilmælið hjá farmaseutinum í felag. Mett verður, at tað tekur umleið 10 minuttir fyri hvønn borgara, tá er eisini høvi til at fáa ivamál og spurningar avgreiddar beinanvegin.

Í áliti um heilsudeplar eru farmaseutar nevndir sum fakbólkur á heilsudeplum, og um farmaseutar verða partur av heilsudeplum er upplagt at fáa hetta í lag. Møguleiki er fyri, at farmaseutur ger møguligar broytingar í Cosmic klárar til lækna at góðkenna áðrenn fundin (Ikki ber til at gera klárt til seponering). Hetta sparir læknanum tíð og kann vera við til at betra um trygd og dygd í sjúklingaskránni í Cosmic – sí meira um hetta seinni.

# 4 Dygd í sjúklingaskrá

Í hesum brotinum verður hugt at, um samsvar er millum heilivágslistarnar í Cosmic og hjá ellis- og røktarheimunum.

## 4.1 Heilivágsavstemman[6]

Heilivágsavstemman merkir, um heilivágslistin á røktarheiminum og heilivágslistin hjá kommunulæknanum (Cosmic) samsvara. Sjálvsagt er ynskiligt at heilivágslistarnir eru eins og dagførdir. Tilmæli frá farmaseuti á hesum øki fevnir um at broyta/avstemma heilivágslistar, so teir vera eins.

Sambært Institut for Kvalitet og Akkreditering i Sundhedsvæsenet (IKAS) eru m.a. dagførdir heilivágslistar av serligum týdningi fyri trygdina hjá borgarum.

## 4.2 Boðanesheimið

Einans 2 út av 26 heilivágslistum vóru eins, tað vil siga, at samsvar er millum heilivágslistarnar í Cosmic og á Boðanesheiminum.

Sera ymiskt er, hvussu stór andsøgn er millum heilivágslistar, men andsøgn er í 0-7 tilbúningum á heilivágslistum hjá einstøku borgarunum á Boðanesheiminum. Flestu borgarar á Boðanesheiminum høvdu 1-4 andsøgnir millum heilivágslistar.

Út av 72 tilmælum um heilivágsavstemman eru 29 góðtikin (40 %). Av teimum 72 tilmælunum er líkt til, at lækni ikki hevur hugt at / tikið støðu til 37 av teimum 72 (51 %). Hetta merkir, at 6 tilmæli eru beinleiðis avvíst (8 %).




[6] **Heilivágsavstemman:** Merkir, um heilivágslistin á ellis- og røktarheiminum (tað sum borgari tekur) og heilivágslistin hjá kommunulæknanum (tað sum er skrásett í Cosmic) eru eins. Um heilivágslistar eru eins, so eru teir avstemmaðir.

## 4.3 Eysturoyar røktar- og ellisheim

Einans 2 út av 28 heilivágslistum vóru eins, tað vil siga, samsvar er millum heilivágslistarnar í Cosmic og á Eysturoyar røktar- og ellisheimi.

Sera ymiskt er, hvussu stór andsøgn er millum heilivágslistar, men andsøgn er í 0-17 tilbúningum á heilivágslistum hjá einstøku borgarunum á Eysturoyar røktar- og ellisheimi. Flestu borgarar á Eysturoyar røktar- og ellisheiminum høvdu 2-5 andsagnir millum heilivágslistar.

Í alt høvdu Eysturoyar røktar- og ellisheim og kommunulæknin gjøgnumgingið 15 av 28 borgarum, tá hagtøl vóru savnað fyrst í juni 2017. Tí eru sjálvsagt nógv tilmælir, sum kommunulæknin ikki hevur góðtikið.

Út av 133 tilmælum eru 36 góðtikin (27 %). Teir 13 borgarar, ið Eysturoyar røktar- og ellisheim ikki hevur gjøgnumgingið enn, hevur lækni sostatt ikki tikið støðu enn - 58 tilmælir (44 %).

Hetta merkir, at 39 tilmæli eru avvíst (30 %). Tó skal sigast, at ilt er at vita, um kommunulæknin hevur avvíst tilmæli, møguliga hevur hann ikki dagført heilivágslistan í Cosmic, men bert heilivágslistan á Eysturoyar røktar- og ellisheimi.




## 4.4 Samanumtikið

Tað tykist sum kommunulæknar ikki meta, at heilivágslistin í Cosmic er av so stórum týdningi. Í øllum førum sæst, at hann ikki verður rættaður, hóast kommunulæknin broytir ávísingina í heilivágslistanum á ellis- og røktarheiminum og/ella ger viðmerkingar í Cosmic um broytingar.

Sostatt er heilivágslistin í Cosmic als ikki dagførdur, hóast tilmæli frá farmaseuti. Hetta kann hava álvarsamar fylgjur í sambandi við t.d. innleggingar á sjúkrahúsi og læknaávísingum.

Ynskiligt er, at tað bert er ein heilivágslisti. Mælt verður til, at ellis- og røktarheim umframt heimarøktarar og sjúkrarøktarfrøðingar fáa atgongd til Cosmic.

# 5 Heilivágsgjøgnumgongd

Í sambandi við heilivágsgjøgnumgongd verður kannað, um heilivágur hjá borgara er skynsamur. Her verða atlit tikin til, um borgari verður viðgjørdur eftir galdandi viðgerðavegleiðingum á sjúkuøkjum, um borgari fær óneyðugan heilivág, um til ber at fækka um heilivágssløg, tablettir og administratiónir, o.s.fr.

## 5.1 Boðanesheimið

Hjá 5 av 26 búfólkum vórðu ongi tilmæli send til lækna. Sostatt vóru tilmæli send kommunulækna hjá 21 búfólkum.

Í alt vóru 69 tilmæli um broytingar eftir heilivágsgjøgnumgongd hjá teimum 21 búfólkunum. 23 tilmæli eru góðtikin av lækna (33 %). Av teimum 69 tilmælunum er líkt til, at lækni ikki hevur hugt at/tikið støðu til 41 av teimum (59 %). Hetta merkir, at 5 tilmæli eru beinleiðis avvíst (7 %).

Tað vísir seg í hesi verkætlan, at fleiri læknar ikki taka sær stundir at hyggja at skrivligum tilmælum frá farmaseuti. Røktarstarvsfólk á Boðanesheiminum og farmaseuturin avtalaðu, at Boðanesheimið skuldi ringja til kommunulæknan, um onki broyttist eftir nøkrum mánaðum, so tíðin ikki var farin til fánýtis. Tað hevði stóra ávirkan á, at kommunulæknar hugdu at tilmælum, um Boðanesheimið ringdi um heilivágsgjøgnumgongd hjá borgara.




## 5.2 Eysturoyar røktar- og ellisheim

Tilmæli vórðu send til lækna hjá øllum borgarum á Eysturoyar røktar- og ellisheimi, tvs. hjá øllum 28 borgarunum.

Í alt vóru 110 tilmæli, harav vórðu 42 tilmæli góðtikin av kommunulækna (38 %). Av teimum 110 tilmælunum er líkt til, at kommunulæknin ikki hevur hugt at/tikið støðu til 52 av teimum (47 %). Sostatt eru 16 tilmæli beinleiðis avvíst (15 %).




## 5.3 Samanumtikið

Tað tykist, sum um kommunulæknar og røktarstarvsfólk taka væl ímóti tilmælum frá farmaseutunum. Tó er líkt til, at kommunulæknar ikki taka sær stundir til at hyggja at tilmælum – serliga um tað er rúgvusmikið.

Tá læknarnir viðgera tilmælini, eru teir í høvuðsheitum samdir við tilmælunum frá farmaseutinum. Í kanningum uttanlands góðtaka læknar millum 34-80 % av tilmælum. Í hesi verkætlan góðtóku kommunulæknarnir ávikavist 82 % og 72 % (hugt verður burtur frá tí, sum lækni ikki hevur tikið støðu til).

Kanningar uttanlands vísa eisini, at beinleiðis samskifti millum lækna og farmaseut er betur enn skriftligt samskifti. Tískil hevði verið ein fyrimunur, at lækni og farmaseutur fáa 10 min. at gjøgnumganga tilmælir hjá hvørjum borgara.

# 6 Nøgdsemi hjá luttakarunum, sum hava verið við at fremja heilivágsgjøgnumgongdinar

Farmaseutarnir hava havt samrøður við nakrar kommunulæknar og røktarstarvsfólk, ið luttóku í arbeiðinum við royndarverkætlanini. Endamálið við samrøðunum var at tosa um, hvørja áskoðan tey hava til royndarverkætlanina og heilivágsgjøgnumgongdir sum heild.

## 6.1 Kommunulæknar

Í samrøðum við kommunulæknar kom fram, at teir sum heild eru jaligir um, at farmaseutar gera heilivágsgjøgnumgongd, og sum oftast eru teir samdir við tilmæli frá farmaseutinum. Onkur lækni vil vera við, at farmaseutar vera ov illa gagnnýttir av heilsuverkinum í Føroyum, tí farmaseutar kunnu stuðla undir, at borgarans viðgerð verður betur og tryggari.

Harafturat meina kommunulæknarnir, at farmaseuturin er við til at góðskutryggja arbeiðið hjá læknanum og at lyfta góðskuna av heilivágsviðgerðini hjá borgara.

Flestu læknar eru samdir um, at tíðarneyð er ein trupulleiki, fyri at kunna gera heilivágsgjøgnumgongd. Onkur lækni vil vera við, at hetta er bert ein spurningur um pening/samsýning, tí ynskiligt er at fáa meira samstarv við farmaseutar um heilivágin hjá borgarum. Kommunulæknarnir ynskja at fáa ein takst fyri heilivágsgjøgnumgongd og fyri at viðgera tilmæli frá farmaseutinum.

Heilivágsgjøgnumgongd og/ella endurskoðan av heilivági hjá borgara er eitt økið, sum kommunulækni vanliga ikki hevur stundir til, men hetta eigur at gerast regluliga.

Kommunulæknar sóknast eisini eftir, at skamtluting av heilivági bert verður gjørd í Cosmic og ikki eisini á pappír, tí skráseting uttanfyri Cosmic hevur við sær, at skrásetingin í Cosmic ikki verður dagførd.

## 6.2 Røktarstarvsfólk

Røktarstarvsfólk vóru sum heild sera jalig mótvegis heilivágsgjøgnumgongdum, sum tænastu til búfólki á røktar- og ellisheiminum. Sum heild mettu tey, at bæði búfólki, avvarðandi og røktarstarvsfólk høvdu havt ágóðan av hesi tænastuni.

Sambært búfólki og avvarðandi kenna tey seg tryggari við heilivágsviðgerðina aftan á heilivágsgjøgnumgongdina. Eisini meta røktarstarvsfólk seg hava fingið betur innlit í heilivág og farmakologi aftan á at hava luttikið í verkætlanini.

Verkætlanin hevur givið røktarstarvsfólki eitt annað slag av fakligari sparring, og hetta hevur førleikament røktina. Hetta er serliga í mun til at geva búfólki heilivág, tí tey eru vorðin meira vitandi um heilivágin, og betur til at meta um heilivágsviðgerðir hjá búfólki.

Boðanesheimið og Eysturoyar røktar- og ellisheim eru ymisk á máli viðvíkjandi tíðarnýtslu og orku. Starvsfólk á Boðanesheiminum mettu, at heilivágsgjøgnumgongd passaði væl til arbeiðið í gerandisdegnum hjá teimum (mest krevjandi at fáa samtykki frá avvarðandi), meðan á Eysturoyar røktar- og ellisheimi hildu tey, at hetta var sera tíðarkrevjandi. Eysturoyar røktar- og ellisheim metti, at tey tørva meira starvsfólkaorku til hetta arbeiðið.

Ilt er at meta um, hvørt borgarar hava fingið tað betur aftan á framda heilivágsgjøgnumgongd, tí so stutt tíð er fráliðin. Røktarstarvsfólk halda tó, at nakrir borgarar hava merkt ein bata - serliga innan pínuøkið.

Røktarstarvsfólk meta, at endurmeting av heilivági og heilivágsgjøgnumgongd hjá borgarum er eitt økið, sum ikki verður raðfest hjá kommunulæknunum. Røktarstarvsfólk hava verið sera samstarvshugaði og ágrýtin at fáa hesa verkætlan at eydnast, og hava gjørt nógv fyri at stuðla farmaseutunum (t.d. við at fylgja tilmælum upp, um kommunulæknin ikki hevur svara innan nakrar mánaðir).

# 7 Úrslit av heilivágsgjøgnumgongd

Ikki ber til at staðfesta, um útreiðslur til heilivág hjá borgarum í hesi verkætlan eru lækkaðar ella hækkaðar. Verkætlanin byrjaði í januar/februar 2017, og ov stutt tíð er fráliðin til at kunna samanbera t.d. útreiðslur í 2016 við 2017. Nøkur tilmælir eru send í mai mánað, og tí hava kommunulæknarnir ikki havt stundir at taka støðu til øll tilmælini enn. Vanliga verður mett, at uppfylging er 3 mánaðir eftir, at tilmælið er sent til læknan, so lækni hevur tíð at fylgja tilmælið upp.

Í verkætlanini sæst tó, at borgarar samanlagt fáa 5 % færri sløg av heilivági og 8 % færri administratiónir aftan á, at heilivágsgjøgnumgongd er framd. Her eru øll tøl tikin við – eisini tølum, sum kommunulæknin ikki hevur hugt at. Hetta merkir, um alt annað er óbroytt, at útreiðslurnar til heilivág mugu lækka, umframt at røktarstarvsfólk spara tíð til at geva/administrera heilivág.

Tað kundi verið áhugavert at samanborið borgarar í verkætlanini við ein eftirlitisbólk, og at kanna um munur er á bólkunum í mun til útreiðslur til heilivág,  tal av innleggingum, heilsustøðu hjá borgarum og nýtslu av ymsum heilsutilboðum (læknavitjan, tól, røktartørv o.a.).

Kanningar uttanlands vísa tó, at nógvir heilivágstrupuleikar eru hjá eldri fólki. Tó er trupult at vísa á, at heilivágsgjøgnumgongd lækkar deyðstíttleikan hjá aldursbólkinum. Hinvegin er líkt til, at færri skaðastovuvitjanir eru. Líkt er eisini til, at til ber at lækka útreiðslur til heilivág hjá borgarum á røktarheimum aftan á heilivágsgjøgnumgongd er framd.

Hendan verkætlan gevur ábendingar um, at útreiðslurnar kunnu lækka – serliga um til ber at fáa læknar at viðgera øll/flestu tilmælini.

**Vegna verkætlanarbólkin**

Hjalti Gunnarstein, Apoteksverkið

Petur Oluf Joensen, Apoteksverkið

Nanna Knudsen, Apoteksverkið

Niels Joensen, Apoteksverkið

Hanna Steinberg, Apoteksverkið

Irena Nolsø, Heilsu- og  innlendimálaráðið

# Hjáløgd skjøl og tilvísingar

## Fylgiskjal I - Orðalisti - allýsing

**Administratión av heilivági:** Tá røktarstarvsfólk geva heilivág til borgara. Talan kann vera um ávísar tíðir, har heilivágur verður givin til borgara.

**Akkreditering:** Ein altjóða góðkend standardiserað ramma sum áleggur, hvørji krøv, prosessir ella fyritøkur sum minimum skulu lúka. Krøvini eru tillagað eftir virkseminum.

**Andsøgn:** Tá mótsøgn er í upplýsingum millum ymsar partar – t.d. at upplýsingar á heilivágslista á ellisheimi og heilivágslista í talgildu Heilsuskipanini (Cosmic) eru ymiskir.

**Cosmic:** Talgilda heilsuskipanin ella journalskipanin í Føroyum eitur Cosmic. Her er journalur, heilivágsmodul, blóðroyndarsvar o.a.

**Heilivágsavstemman:** Heilivágsavstemman merkir, um heilivágslisti á røktarheimi (tað sum borgari tekur) og heilivágslisti hjá lækna (tað sum er ordinera í journalskipan - Cosmic) eru eins. Um heilivágslistar eru eins, so eru teir avstemmaðir.

**Heilivágsgjøgnumgongd:** Heilivágsgjøgnumgongd er ein kritisk gjøgnumgongd av hvørjum einstøkum heilivági. Her verður kannað, um heilivágur hjá borgara er skynsamur. Atlit verða tikin til, um borgari verður viðgjørdur eftir galdandi viðgerðarvegleiðingum á sjúkuøkjum, um borgari fær óneyðugan heilivág, um til ber at fækka um heilivágssløg, tablettir og administratiónir og um borgari hevur sjúku, sum ikki verður viðgjørd o.s.fr.

**IKAS:** Institut for Kvalitet og Akkreditering i Sundhedsvæsenet. IKAS hevur ment "Den danske kvalitetsmodel", sum Sjúkrahúsverkið í Føroyum er akkreditera eftir. Standardrammur finnast til ymisk økir m.a. sjúkrahús, apotek, læknaviðtalur, fysioterapeutar, røktarheim, tannrøkt o.a.

**Seponering:** Tá lækni steðgar viðgerð, er talan um seponering.

**Skamtluting av heilivági (dosisdispensering):** Tá Apoteksverkið pakkar heilivág í posar til borgara. Posarnir verða pakkaðir til 14 dagar í senn, og hvør posi er til eitt ávíst tíðspunkt á einum ávísum degi.

**THS:** Talgilda heilsuskipanin – sí cosmic.

Fylgiskjal II - Tilvísingar


http://www.ikas.dk/deltagere-i-ddkm/almen-praksis/standardsæt/-/Patientsikkerhedskritiske%20standarder/2-5

http://www.ikas.dk/deltagere-i-ddkm/almen-praksis/standardsæt/-/Patientsikkerhedskritiske%20standarder/2-2

http://www.cochrane.org/CD008986/EPOC_reassessment-drugs-given-hospitalised-adult-patients-improve-patients-health

http://medlemsnettet.apoteket.dk/apotek/sundhedsydelser/medicingennemgang/Salg%20og%20markedsfring/Evidensgrundlag%20-%20kvalitetssikret%20lægemiddelanvendelse.pdf

Askaa L, Kirkeby B, Due L. Implementering af medicingennemgang til beboere i kommunale plejeboliger i Region Hovedstaden med fokus på nedbrydning af kendte barrierer. 2012.

Region Syddanmark. Kvalitetssikring af ældres lægemiddelanvendelse - Samarbejde om medicingennemgang i tre kommuner i Region Syddanmark. 2010.

Vermehren C, Madsen, G K. Medicingennemgang på Kalundborg Kommunes plejecentre Lægemiddelenheden, Kvalitet og Udvikling, Region Sjælland; 2015.

Verrue CL, Petrovic M, Mehuys E, Remon JP, Vander Stichele R. Pharmacists' interventions for optimization of medication use in nursing homes : a systematic review. Drugs & aging. 2009;26(1):37-49.

Verrue C, Mehuys E, Boussery K, Adriaens E, Remon JP, Petrovic M. A pharmacist-conducted medication review in nursing home residents: impact on the appropriateness of prescribing. Acta clinica Belgica. 2012;67(6):423-9.

## Fylgiskjal III - Mannagongd í verkætlan – í stuttum

Starvsfólk á røktarheimunum samla upplýsingar um heilivág hjá borgarunum og skjalfesta diagnosur og møguligar trupulleikar hjá borgarum. Harumframt fáa røktarstarvsfólk borgarar ella avvarðandi at undirskriva samtykki fyri luttøku í royndarverkætlanini. Hetta gevur farmaseuti heimild til upplýsingar um heilivág og journalina hjá borgara.

Farmaseutur avstemmar heilivágslistan við at samanbera heilivágslista frá ellisheimi við ordinationslistan í journalskipanini - Cosmic. T.v.s. samanbering millum tað, sum borgarin veruliga fær á ellisheimi við tað, sum er ordinerað í Cosmic.

Farmaseutur fremur heilivágsgjøgnumgongd á apotekinum. Hetta er strukturerað og kritisk gjøgnumgongd av øllum heilivágnum, borgarin tekur við tí fyri eygað at optimera viðgerðina. Til hvønn heilivág verður støða tikin til:

*Um borgari hevur nakra indikatión, sum er uttan viðgerð, og um onkur viðgerð er uttan indikation.*

*Hvussu doseringin er; fær borgarin ov lítið ella ov nógv, er hetta røtt viðgerð, og hvussu leingi skal borgarin vera í viðgerð. Viðgerðir verða samanbornar við ymiskar guidelines innan sjúkuøkir. Tilmæli til broytingar fyri viðgerðir vera skjalfest.*

Farmaseutur og røktarstarvsfólk á Boðanesheiminum møtast og semjast um, hvørji tilmæli skulu sendast víðari til lækna at taka støðu til. Farmaseutur samlar tilmælini og sendir tey til lækna í Cosmic. Her verður noterað indikatión/preparat, observatión av borgara og heilivági, tilmæli til broytingar og tilvísingar til keldur/guidelines í sambandi við tilmæli.

Farmaseutur og røktarstarvsfólk á Eysturoyar røktar- og ellisheimi møtast og diskutera, hvørji tilmæli røktarstarvsfólk skal senda víðari til lækna. Røktarstarvsfólk tekur tilmæli upp við lækna, tá hann eina ferð um vikuna gongur stovugongd á ellisheiminum.

Fylgiskjal IV - Flowdiagram



## Fylgiskjal V - Útreiðslumetingar

| 3.1 | | | |
|---|---|---|---|
| **Árligur kostnaður av heilivágsgjøgnumgongd hjá farmaseuti** | **Tal av borgarum** | **Heilivágsgjøgnumgongd** | |
| | | 1 ferð um árið | 3. hvørt ár |
| Borgarar á røktar- og ellisheimum | 650 | 650.000 | 216.667 |

| 3.2 | | | |
|---|---|---|---|
| **Árligur kostnaður av heilivágsgjøgnumgongd hjá kommunulækna** | **Tal av borgarum** | **Heilivágsgjøgnumgongd** | |
| | | 1 ferð um árið | 3. hvørt ár |
| Borgarar á røktar- og ellisheimum | 650 | 90.311 | 30.104 |
| Borgarar 65+ | 4006 | 556.594 | 185.531 |

| 3.5 | | | |
|---|---|---|---|
| **Árligur kostnaður av heilivágsgjøgnumgongd hjá farmaseuti** | **Tal av borgarum** | **Heilivágsgjøgnumgongd** | |
| | | 1 ferð um árið | 3. hvørt ár |
| Borgarar 65+ | 4006 | 4.006.000 | 1.335.333 |

| **Mettur kostnaður fyri hvørja heilivágsgjøgnumgongd** | **kr.** |
|---|---|
| Farmaseutur | 1.000,00 |
| Kommunulækni | 138,94 |
| **Tilsamans** | **1.138,94** |